Tær av tungu ástar orð kann ljóða
Lag: “Alperosen” A dur

```
    A                                          E
1. Tær av tungu ástar orð kann  ljóða,
                              E7               A
hon kann byggja stór ok, vøkur slott,
                                               D
gull og grønar lundir kann hon  bjóða,
        A      E7                 A
fáa alt at  tykjast ljóst og gott.
```

2/4. Tunga tín kann geva vina lyfti ,
lova trúskap  jarðarlívið út,
seinni tú við somu tungu skifti,
søkti trúgvan vin í djúpa sút.

3/4. Tunga tín kann hevndar orðið beiska,
sleingja út mót teim, tú elskar mest,
vevur saman gott við alt hitt sleiska,
rætt, sum so av øllum, tað var best.

4/4. Men ein dag ei meira hon kann mæla,
og tú gjøgnum síðsta svøvnin fert,
tí er vert at ansa, hvat vit tala,
reinført tos, og reinført alt tú gert.

av H.J. Glerfoss.   TUNGAN